Anfinn Kallsberg, løgma›ur vísir aftur atfinningur frá partamanni:

Hvørki n‡val ella n‡ggj samgonga

-Mín høvu›suppgáva er at røkka á mál, og eg fari at taka mær ta tí›, sum er ney›ug til tess. Tí›in er ikki avgerandi fyri meg. Ta› er innihaldi› harafturímóti sigur Anfinn Kallsberg, løgma›ur og forma›ur Fólkafloksins, nú fyrrverandi fólkaflokstingma›ur heldur, at løgma›ur eigur at skriva út n‡val ella taka a›rar flokkar uppí samgonguna

Mynd: Jens Kristian Vang

JAN MÜLLER

Hóast rættiliga hvassar atfinningar frá einum av sínum partamonnum, fyrrv. fólkaflokstingmanninum, Birgir Danielsen, móti rikna fullveldispolitikkinum, so letur Anfinn Kallsberg, forma›ur í fólkaflokkinum og løgma›ur seg ikki førka. Hann stendur so stinnur sum nakrantí› og er sannførdur um, at arbei›i hansara í Tinganesi fyri at finna eina brei›a semju skal koma á mál fyrr ella seinni. Og hann ætlar sær heldur ikki at taka vi› rá›unum frá Birgir Danielsen, um antin at skriva út n‡val ella siga samgonguskjali› upp og fáa fleiri flokkar út í Tinganes.

-Eg havi lisi› samrø›urnar vi› Birgir Danielsen og Jógvan Sundstein vi› stórum áhuga. Ta›, sum eg havi fingi› burtur úr, er, at bæ›i Birgir Danielsen og Jógvan Sundstein eru samdir um, at vit skulu hava sjálvst‡ri í Føroyum. Og ta› rokni er vi›, at 75% av føroyingum eru samd um. Ta›, sum Jógvan Sundstein og Birgir Danielsen ikki eru samdir um, er, hvussu skjótt vit gera ta› og uppá hvønn hátt. Og ta› er „misseran“ í øllum hesum máli, og tí havi eg tosa› um eina brei›a semju og stóra undirtøku - at man eigur at finna fram til, hvat man kann semjast um. Vit eru samdir um at røkka málinum, og ta› er ta›, sum eg eisini gangi eftir.

Hør› or›

Anfinn Kallsberg, løgma›ur vi›gongur, at or›ini hjá partamanninum Birgir Danielsen um, at hann letur seg manipulera av Høgna Hoydal, eru hør› or›.

-Men veruleikin er tann, at skal man finna eina brei›a semju, so eru vit noydd til at finna fram til, hvussu vit røkka slíkari semju. Sjónarmi›ini hjá Birgir Danielsen í mun til Høgna Hoydal, eru, at me›an Høgni vil hava eina skjóta knappa loysn, vil Birgir Danielsen hava eina meira langsikta›a trygga loysn.

Mín uppgávu er so koma har fram til, at vit fáa eina loysn og eina, sum ber. Høgni Hoydal sigur eisini, at hann gott kann gó›taka eina f‡ra ára skiftistí›, me›an tann trygga loysnin, sum landsst‡ri› er fari› eftir, er 15 ár.

Anfinn Kallsberg sigur, at ta›, sum er mest avgerandi fyri hann, er, at innihaldi› í hesi avtaluni er so miki› trygt fyri tann einstaka borgaran, at ta› fæst ein brei› undirtøka fyri tí í fólkaatkvø›uni.

-Vit eru samdir um málsetningin. Vit eru bara eitt sindur ósamdir um, hvussu vit røkka honum, og har er Javna›arflokkurin eisini vi›.

Mín høvu›suppgáva er at røkka á mál, og eg fari at taka mær ta tí›, sum er ney›ug til tess. Tí›in er ikki avgerandi fyri meg. Ta› er innihaldi› harafturímóti.

-Men er stø›an ikki komin til at taka eitt n‡val?

-Ta› kann man altí› gera. Ta› er tann lættasta loysnin at taka. Men ta› er ikki vist, at ta› er tann besta loysin, í hvussu er ikki fyri framtí›ina hjá føroyingum, tí føroyingar eru samdir um, at ta› skulu broytingar til, at vit skulu røkka á mál vi› at vit sjálvir taka ábyrgd av hesum landinum. Ta› er ta› avgerandi í hesum. At útskriva val er tí eingin loysn.

Uppá fyrispurning um hann ikki tá fer at taka a›rar flokkar uppí landsst‡ri› sigur løgma›ur, at ta› er avgjørt ney›ugt at royna at tryggja sær eitt so breitt parlamentariskt grundarlag undir hesum sum gjørligt. Hvussu ta› skal gerast finnast kanska nógvir mátar.

Um ta› merkir, at a›rir flokkar skulu út í Tinganes eisini vil løgma›ur ikki gera vi›merkingar til.

-Vit hava eitt samgonguskjal og eina samgongu og hava sett okkum eitt mál. Vit mugu nokk sta›festa, at ta› gongur ikki so væl at fáa hin partin, tvs. donsku stjórnina at gó›taka tær loysnir, sum vit ynskja. Tí mugu vit finna út av, um vit kunnu røkka málinum uppá onkran annan máta.

Løgma›ur sigur, at landsst‡ri› ynskir at fáa næsta samrá›ingarumfar so skjótt til ber. Danir hava sagt, at teir kunnu møta okkum í Danmark hálvan august. Vit ynskja, at fundurin skal ver›a í Føroyum. Dagurin fyri næsta fund er ikki ásettur, men vit mi›ja móti, at hann skal vera í Føroyum.

Danmarks Radios Pigekor vitjar

Gentukórið úr danska Útvarpinum – Danmark Radio Pigekor er á konsertferð í Føroyum.

Kórleiðari er Tage Mortensen

Kórið hevur hesar konsertir

Týsdagin 27. juni kl. 15:00 konsert í Viðareiðis kirkju.

Kl. 17 sama dag konsert í Kristjanskirkjuni.

Mikudagin 28. juni kl 20 konsert í fimleikarhøllini í Fuglafjarðar skúla.

Hósdagin 29. juni kl. 20 konsert í Aulini í Tórshavnar kommunuskúla.

Fríggjadagin 30.juni syngja kl. 19:00, tá ið Málningaframsýningin á Varmakeldu verður sett í fimleikarhøllini. Aftan á kl. 20:00 verður konsert í fimleikarhøllini við Håkan Hagegård (baryton) og Elisabeth Boström (klaver)

Sunnudagin 2. juli kl. 16 konsert í Fuglafjarðar kirkju. Kórið syngur undir hámessuni sama dag.

– Eg haldi meg til stevnuskrá Fólkafloksins

Vit hava nevniliga fingi› Tjó›veldisflokkin at taka til sín uppskoti› hjá Fólkaflokkinum. Men ta› er væl møguligt, at vit ikki fáa ta› positiva mótspæl frá danskari sí›u, at vit koma ígjøgnum vi› tí heldur.

JAN MÜLLER

Anfinn Kallsberg, løgma›ur sigur, at ta› er sjálvandi ymiskt, hvussu fólkafloksfólk halda, at vit skulu koma á mál í hesum sjálvst‡ris/fullveldisspurninginum.

-Eg haldi meg so fyrst og fremst til stevnuskránna hjá Fólkaflokkinum, sum er púra grei›. Hetta samrá›ingaruppleggi› vit koyra eftir er jú júst fólkafloksuppskoti› til loysn av hesum málinum til seinasta val. Ta› tykist mær tí løgi›, at málsetningurin vit arbei›a eftir og sum er programmi› hjá Fólkaflokkinum, ikki hevur fulla undirtøku í flokkinum. Men ta› er so metingin hjá Birgir Danielsen og ø›rum. Eg veit so ikki, um tey hava skilt bo›skapin til sí›sta val.



Mynd: Jens Kristian Vang

Forma›ur Fólkafloksins leggur aftrat, at ta› er ta› íslendska modelli› landsst‡ri› koyrir eftir.

Anfinn Kallsberg er annars ikki samdur vi› Birgir Danielsen, at næsta stig er at gera eina loysn innan fyri Ríkisfelagsskapin, tí ta› stigi› metir hann okkum vera í í løtuni.

-Spurningurin er, hvussu vit koma úr tí stø›u og fram til, at føroyingar taka ábyrgd av Føroya landi og harvi› evsta vald.

Spurningurin er ikki um 1. og 2. stig men um eina prosess frá verandi stø›u og fram til endamáli›.

-Tú hevur lati› teg draga so lamgt út á djúpt vatn av Høgna Hoydal, at tú grynnir ikki aftur sigur Birgir Danielsen?

-Ta› er beint tvørturímóti, sum Jógvan Sundstein eisini sigur. Vit hava nevniliga fingi› Tjó›veldisflokkin at taka til sín uppskoti› hjá Fólkaflokkinum. Men ta› er væl møguligt, at vit ikki fáa ta› positiva mótspæl frá danskari sí›u, at vit koma ígjøgnum vi› tí heldur.

Tá er spurningurin, hvussu vit røkka endamálinum, sum einir 5 flokkar í dag eru samdir um. Vi› hesum sipar løgma›ur eisini til Javna›arflokkin og Mi›flokkin.

Anfinn Kallsberg, løgma›ur heldur, at sjálvst‡risuppskoti› hjá Javna›arflokkinum hevur sama endamál sum uppskoti› hjá landsst‡rinum men bara uppá ein annan máta.

Anfinn Kallsberg, løgma›ur :

– Danir vilja als ikki hava broytingar

-og vilja heldur ikki gó›taka uppskoti› hjá Javna›arflokkinum, tá avtornar sigur løgma›ur, sum sjálvur onga ætlan hevur um at leggja kongin

Mynd: Jens Kristian Vang

JAN MÜLLER

Anfinn Kallsberg, løgma›ur hevur varhugan av, at danska stjórin als ikki ynskir, at vit fara nakran veg á sjálvst‡rislei›. Hon vil tvørturímóti hava status quo. Tvs. ongar broytingar ella so fáar sum gjørligt.

-Eg trúgvi heldur ikki, at danir vilja gó›taka uppskoti› hjá Javna›arflokkinum, tá avtornar. Sjálvt um danir siga, at vit fáa ta› vit vilja, so er ta› ikki rætt. Tí tá hev›i skiftistí›in ikki veri› nakar trupulleiki.

Løgma›ur heldur, at uttan at m‡kja stø›una og draga í land og finna semjur og vera opnir fyri kompromiium, ver›ur eingin loysn. Ta› harmar hann mest, at danska stjórnin er kompromileys, tá ta› kemur til skiftistí›ina, tí harvi› fastlæsur hon eina stø›u.

-Ta› er galdandi í øllum lívsins vi›urskiftum, at vil man ikki gera kompromiir, so er ver›ur ta› til konfrontatión, og ta› er sjáldan, at naka› gott spyrst burtur úr tí.

-Hvar hava tit víst vilja til kompromi?

-Vit hava lagt nøkur uppskot fram, sum eru kveistra› av bor›inum totalt.

Landssst‡ri› hevur nú bi›i› um at fáa sett eina nevnd til at kunna fara inn í ta›, sum man er ósamdur um, men ta› er eisini víst aftur av dønum.

Hetta var bara ætla› at taka upp spurningar um slíkt sum skattatr‡st, solei›is at bá›ir partar tulka málini rætt.

-Tann gó›i spurningurin er, hvat man so ger. Og ta› vil eg ikki tjakast vi› pressuna um.

Ta› stutta av tí langa er, at Anfinn Kallsberg, løgma›ur ætlar sær ikki at leggja kongin, hóast ta› eru for›ingar.

-Hetta er eitt stórmál, har allir flokkar vilja hava broytingar.

Anfinn Kallsberg ætlar sær tí ikki at gevast, men royna at finna eina loysn fyri hetta stóra mál fyri framtí› Føroya, sum hann málber seg.